**inni** - trygt og ómaksleyst til hús



### Sethús – Jóansgøta 11, Hoyvík

Húsini eru í 2 hæddum - hvør á 118 fermetrar - í alt 236 fermetrar. Grundøkið er 504 fermetrar. Byggiár: 2000. Í erva er inngongd, durur, hall, hjúnarrúm, baðirúm, kamar, matarkøkur við útgongd til terassu / altan, kovi, borðsstova / stova, hugna- og útsýnisstova. Í neðra er trappugongd / hall, inngongd, kamar, klædnarúm, vaskirúm og stórt kjallararúm, har møguleiki er fyri at gera íbúð og klárt er at gera baðirúm. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og hava sera gott útsýni. Har er spæliplass við fótbóltsvølli og stutt er til skúla, barnagarð og busssamband. Prísuppskot: kr. 2.600.000,00



### Sethús – Skálavegur 122, Skála

Húsini eru í 3 hæddum - hvør hæddin 52 fermetrar, samlað búvídd 156 fermetrar. Grundøkið 788 fermetrar. Byggiár: 1945. Ymiskar umvalingar eru gjørdar m.a. er tak, klædningur og vindeygu skift. Í miðhæddini er gongd, køkur og 2 stovur. Í ovastu hædd er gongd, baðirúm, hjúnarrúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Húsini eru stoypt heilt upp, eru klødd við plastklædningi og hava jarntak. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Leitisvegur 48, Saltangará

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd er 225 fermetrar. Grundøkið er 600 fermetrar. Byggiár: 1973. Fleiri umvælingar eru gjørdar við húsini seinastu árini m.a. eru vindeygu, hurðar, oljutangi og brennari skift, og niðara hæddin er innrætta. Í ovaru hædd er durur, gongd, kamar, hjúnarrúm, baðirúm og køkur / stova við útgongd til stóra altan. Í niðaru hædd er durur, gongd, køkur, baðirúm, 2 kømur, fýrrúm, goymslurúm og kjallararúm. Møguleiki er fyri at byggja garagu omanfyri húsini, og tekning er tøk. Húsin standa niðanfyri vegin mitt í Saltangará og hava sera gott útsýni út yvir fjørðin. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Summarhús – Bakkavegur 3, Haldarsvík

Húsini eru í 3 hæddum, miðhæddin er uml. 33 fermetrar, kjallarin nakað minni, og ovasta hædd er uml. 20 fermetrar. Hartil er hjallur á 10 fermetrar. Grundøkið er 131 fermetrar. Byggiár uml: 1900. Ymiskar umvælingar eru gjørdar. Takið er skift og hevur tætt tróður, og húsini eru bjálvað av nýggjum. Í miðhæddini er gongd, baðirúm, kamar, køkur og stova. Í ovastu hædd er "úti á loft" og 2 kømur. Í niðastu hædd er kjallararúm / fýrrúm. Húsini standa mitt í bygdini, tætt við sjóvarmálan, og útsýni er út á fjørðin og yvir á hægstu fjøll í Føroyum. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Grundstykki – Grannatún 14, Saltangará

Grundstykki er 408 fermetrar mitt í Saltangará og hevur sera gott útsýni yvir Skálafjørðin. Ein garaga á 21 fermetrar hoyir til. Stykkið verður selt, um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Børkugøta 9, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum. Niðara hæddin er 104 fermetrar og ovara hæddin er 75 fermetrar - í alt 179 fermetrar. Grundøkið er 500 fermetrar. Byggiár: 1985. Í miðhæddini er inngongd, durur hall, køkur / alrúm, borðstova / stova, skrivstova / kamar, baðirúm / wc / vaskirúm, bryggers / fýrrúm og hjallur. Í ovaru hædd er trappugongd, hjúnarrúm / stova, baðirúm og 3 kømur. Húsini, sum eru í sera góðum standi, standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinarligum umhvørvi og hava gott útsýni. Prísuppskot: kr. 2.500.000,00.



### Handilsbygningur til leigu – Dr. Jakobsensgøta 5, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum hvør á 58 fermetrar – í alt 174 fermetrar. Húsini eru í góðum standi og eru dagførd so við og við. Í miðhæddini er inngongd, gongd, 2 skrivstovur, tekøkur. Í ovastu hædd er trappugongd, køkur, stova, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd inngongd, 2 handilshøli, wc, køkur, kjallari / fýrrúm. Hartil er úthús / goymslurúm. Húsini standa sera væl fyri mitt í býnum við virkna handilsgøtu. Tey kunnu eins væl nýtast til privat sum til vinnuligt endamál og kunnu leigast í einum ella hvørt leigumál sær.



### Nýggj sethús – Heygagerði 3, Sandavágur

Húsini eru í 1 hædd - í alt 143 fermetrar. Harav er garaga á 23 fermetrar. Grundøkið er 564 fermetrar. Byggiár: 2006. Har er inngongd, durur / gongd / gestawc, bryggers við innbúgvi og útgongd til sera snøgga garagu og hjall við egnari útgongd, køkur / alrúm / stova, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Møguleiki er fyri at innrætta loftið. Gólvhiti og seriuforbundin roykvarnaraskipan er í øllum húsinum. Húsini eru sera væl gjørd við góðum handverki og góðum tilfari. Tey eru væl bjálvað og sera bílig í drift. Húsini standa í sera náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við sera góðum sólargangi og panoramaútsýni yvir bygdina og vágna. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Spógvavegur 14, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 100 fermetrar - í alt 200 fermetrar. Grundøkið er 415 fermetrar. Húsini eru bygd í 1977, men eru umvæld og dagførd í 2007. Í erva er hjallur, inngongd, durur, gongd, køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd til svala, hjúnarrúm, baðirúm, og kamar. Í neðra inngongd, gongd, baðirúm, stova, køkur, kamar, vaskirúm og stór og snøgg garaga. Uttan um er sera hugnaligur garður / urtagarður, altanur og stór terassa. Húsini eru sera livilig og standa í hugnaligum, friðarligium, barnavinaligum umhvørvi við blindan veg, og har er veðurgott við góðum sólargangi. Stutt er til dagstovnar, bussamband, stadionøkið og handlar. Prísuppskot: kr. 2.300.000,00



### Íbúð – Jónas Broncksgøta 19-4, Tórshavn

Íbúðin er í einari hædd á 48 fermetrar + 4 fermetrar hjallur / goymslurúm. Har er inngongd, durur / gongd, baðirúm, kamar og køkur / borðsstova / stova. Hartil er hjallur og goymslurúm. Íbúðin liggur sera væl fyri í veðurgóðum og eldravinaligum umhvørvi mitt í býnum, har stutt er til alt. Prísuppskot: kr. 1.100.000,00.



### Stásilig sethús – Varðabú 8, Tórshavn

Sera stásiligu arkitektteknaðu húsini, sum eru í serflokki til útsjónd, møguleikar og dygd, og hvussu væl tey standa fyri, eru í 2 hæddum - hvør á 155 fermetrar - í alt 310 fermetrar. Grundøkið er 518 fermetrar. Byggiár: 1997. Í erva er inngongd, durur, gongd, baðirúm, hjúnarrúm, 2 kømur, bryggers við egnari inngongd og niðurgongd til niðaru hædd, køkur / alrúm / borðsstova, stova, hugna- og sjónvarpsstova við brenniovni / peis og útgongd til svala. Í neðra eru 2 inngongdir, hjallur, vaskirúm, garaga við sjálvvirkandi hurð og stórt kjallararúm, ið er klárt at innrætta til bústað. Húsini standa í miðbýarøki í vøkrum, veðurgóðum og friðarligum umhvørvi við blindan veg og hava góðan sólargang og gott útsýni. Heilt stutt er til viðarlund, skúla, dagstovn, busssamband, miðbý og handilsøki. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Jarnstovugøta 4, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum - niðara á 60 m2 og ovara á 68 m2 - í alt 128 fermetrar. Hartil er garaga á 30 fermetrar. Grundøkið er 409 fermetrar við byggistigi á 0,5. Byggiár 1950, men húsini eru høvuðsumvæld í árunum 1995-2005. Í erva er inngongd, durur / garderoba / gongd, køkur / borðsstova / stova, hjúnarrúm, baðirúm og trappugongd. Í neðra er inngongd, gongd, stova, kamar, baðirúm og bryggers / vaskirúm / fýrrúm. Garagan hevur el-portur og grøv. Húsini hava hampiligt útsýni og standa mitt í býnum í friðarligum umhvørvi við góðum sólargangi nær við skúlar, barnagarðar, handilsumhvørvi og SMS. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Tvíhús – Flatabø 3, Eiði

Húsini eru eini tvíhús í 3 hæddum - samlað búvídd uml. 135 fermetrar, umframt ein krúpikjallari á uml. 30 fermetrar. Grundøkið er 361 fermetrar. Byggiár: 1959. Í miðhæddini er gongd, 2 stovur og køkur. Í ovastu hædd er gongd, baðirúm, 2 kømur og hjúnarrúm. Í niðastu hædd er goymslurúm, kjallararúm, fýrrúm / vaskirúm og krúpikjallari. Húsini standa í hugnarligum umhvørvi í Korndali og hava partvís garð og urtagarð runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

**inni**

Sosialurin 341800
Sosialurin